# Oyggjablaðið


**Oyggjaredaktiónin:**



Snorri Brend
snorri@sosialurin.fo



Jens Kristian Vang
jensk@sosialurin.fo



**Oyggjablaðið næsta mikudag:**

**Jóansøka**


# GREASE Á KARNIVALI



Aftur í ár verður skipað fyri karnivali á Eystanstevnu.

Ítróttarfólk í øllum aldri frá feløgunum Støkk, NSÍ og Kappróðrarfelagnum NSÍ luttaka. Karnivalurin verður fríggjakvøldið 18. juni. Byrjað verður í Glyvra skúla kl. 19, og haðani verður gingið út á Torgið, har stevnan verður sett.

Í ár verður temað "Grease", sum er ein kendur filmur frá 1978. Eins og undanfarin ár, verður nógv gjørt burturúr, og luttakararnir fara á besta hátt at lýsa tema'ið við millum annað búnum, útgerð og gomlum bilum.

Tá luttakararnir er komnir á økið, fáa øll, bæði luttakarar og onnur, høvi at royna Zumba, sum Bodil H. Tausen skipar fyri.

Tað verður spennandi at síggja, hvat luttakararnir hava fingið burturúr, og gleða vit okkum til karnivalin í ár.

GREASE